# Byggja nýtt í Kili

Íslendska reiðaríið Ísfélag Vestmannaeya skrivaði seinasta fríggjadag undir sáttmála við skipasmiðjuna ASMAR í Kili um eitt skip til uppisjóvarfiskiskap. Skipið, sum verður útgjørt til nót og trol, verður 71 metrar langt, knappar 15 metrar breitt og fer at taka umleið 2.000 tons. Tað er norska fyritøkan Rolls Royce, sum hevur teknað skipið, ið sambært sáttmálanum skal latast eigarunum á sumri í 2010. ASMAR-skipasmiðjan hevur smíðað íslendingum skip fyrr, og skipasmiðjan smíðar nú eitt skip fyri íslendsku sjóverjuna.



# Split í Suðurgrønlandi

Grønlendska ferðavinnufyritøkan Destination South Greenland er komin í vanda, nú tvær av kommununum, sum eiga fyritøkuna, hava boðað frá, at tær ætla sær burtur úr samstarvinum. Kommunurnar Narsaq og Nanortalik eiga DSG saman við Qaqortoq kommunu, og har eru fólk sera misnøgd við ætlanina hjá hinum báðum kommununum. Kaj Egede, sum er formaður í Vinnuráðnum í Qaqortoq, sigur við KNR, at nógv privatfólk hava gjørt íløgur í ferðavinnuna í Suðurgrønlandi. Alt kann fara fyri bakka, og vit missa tey fremmandu ferðafólkini, fara tær báðar kommunurnar burturúr, sigur hann.

hevði uppá hjarta. Tosað var um branding av Føroyum og branding av føroyskum fyritøkum. Meirilutin av teimum, sum traðkaðu fram í hesum høpinum, vóru menn. Fleiri úr toppinum í føroyska vinnulívinum, sum søgdu, hvussu umráðandi hetta var fyri Føroyar, og her eri eg púra samd.

Eitt sum tó undraði meg, var, at eg ikki legði til merkis, at nakar av teimum tók uppaftur, hvussu Bill Clinton stuðlar konu síni, nú hon stillar upp sum valevni fyri demokratarnar til Hvítu Húsini í Washington. Hann ivast ikki, tá hann var spurdur um, hvussu hon fór at klára seg. Hon fer at klára seg væl, var hann vísur í, og kanska á summum økjum betri enn hann sjálvur. Og so vísti hann á ávísar kvalifikatiónir, sum hon hevur í mun til hann.

Eg hugsaði við mær sjálvari, at bara teir føroysku mennirnir fingu hatta við á jøvnum føti við branding, umhvørvispolitik og so framvegis. Kanska fer Føroya Arbeiðsgevarafelag at bjóða Hillary til Føroyar um nøkur ár, um hon gerst forseti í USA.

Innan javnrættindi eru Bill og Hillary eitt øðrvísi, men eisini hugvekjandi par, sum vit í Føroyum kundu lært nógv av. Eitt samfelag hevur ikki ráð til í longdini at yvirsíggja eina so dýrabara rávøru sum vælkvalifiserað arbeiðsmegi er, har kvinnur sjálvandi eru íroknaðar. Um hetta framhaldandi verður rákið, koma tær ungu kvinnurnar ikki aftur til Føroyar. Tað hoyrdu vit í Degi & Viku fríggjakvøldið, og heldur tað áfram, so verður eisini synd í teimum føroysku monnunum upp á longri sikt.

Ofta ber prátið um javnrættindi brá av, at kvinnurnar vilja útkonkurrera mennirnar, og at vit eru so ymiskar frá monnunum, sum mangan eisini verður uppfatað sum veikleiki. Vit hava somu útbúgvingar, so vit kunnu ikki annað enn at hava rættuliga nógv til felags. Í veruleikanum snýr tað seg heldur um at síggja tað góða í, at vit eru ymisk og á tann hátt duga at gagnnýta styrkirnar hvør sær.

Skal Føroyar framhaldandi vera kappingarført og eitt gott land at búgva í, mugu vit øll kýta okkum og brúka allar resursir uttan mun til kyn.

### Føroyar eru aftanfyri

*Enn eru luftalsliga fáar kvinnur í leiðslustørvum. Hví?*

- Ein orsøk kann vera, at tað er lutfalsliga nýtt, at kvinnur í Føroyum eru á arbeiðsmarknaðinum og uppaftur nýggjari, at kvinnur í vaksandi mun fáa sær hægri útbúgving. Har skal tilvenjing og tilvitan hjá arbeiðsgevaranum um, at hann í veruleikanum hevur fleiri evni at velja ímillum. Hetta forklárar tó ikki alt. Onnur norðurlond hava somu avbjóðing, men har hava kvinnur verið á arbeiðsmarknaðinum longri enn í Føroyum.

Í Føroyum síggja vit oftani, at leiðslur eru samansettar av lestrarfeløgum ella vinmonnum, og slík netverk eru ring at kappast við hjá kvinnunum. Hetta gongur ofta aftur í nevndum eisini. Samstundis er hatta natúrligt, tí man kennir tað aftur frá lestrartíðini, tá man arbeiddi við verkætlanum og skjótt fann út av, hvør verkætlanarbólkur virkaði væl saman bæði fakliga og sosialt, og so helt man seg til hendan. Helst átti starvssetanarhátturin í Føroyum at verðið broyttur.

Í Danmark eru tey komin nakað longri, tí kvinnur hava verið longri á arbeiðsmarknaðinum har enn í Føroyum. Har verður eisini í nógvum førum farið meiri professionelt til verka, tá fólk verða sett. Oftani skalt tú til fleiri samrøður. Tá eg varð sett í starvið, eg røkti í Danmark, var eg til fimm samrøður. Tvær tær fyrstu samrøðurnar gingu fyri seg hjá einari konsulentfyritøku. Fyrst skuldi eg taka eina roynd, sum skuldi tekna ein ávísa mynd av mær og fyri at vita, um eg hevði teir eginleikar, leiðslan ynsktu sær til starvið. Síðani skuldi eg loysa tvær uppgávur, har onnur var ein marknaðarførings-uppgáva í altjóða høpi og hin ein týðingaruppgáva á enskum og sponskum. Hetta var ein altjóða fyritøka, har málskunnleiki og kunnleiki um altjóða marknaðir var týdningarmikil. Ikki fyrr enn



*Sum einasta av fýra systkjum valdi Brynhild Setberg at flyta heimaftur til Føroya, sjálvt um hon hevði fingið gongd í eina lovandi vinnulívskarrieru í Danmark*

hesar uppgávurnar, saman við profilinum av mær var góðtikin, slapp eg inn at tosa við stjóran í fyritøkuni. Starvsetanarhátturin gav eina góða kenslu, tí tú visti, at tú vart sett út frá egnum førleikum. Hetta var ein spennandi fyritøka at arbeiða í, har avlopið vaks 25-35 prosent um árið.

Eg spurdi einaferð stjóran hjá mær, hvussu hann fekk ein slíkan vøkstur at bera til. Hann svaraði einfalt: »Tú skalt hava eina greiða fatan av, hvat tú vilt og seta tey røttu fólkini«. Eg spurdi hann, hvat hann meinti við at seta tey røttu fólkini: »Tú skalt fyrst og fremst spyrja inn til, hvørji úrslit og avrik ein umsøkjari hevur at vísa á«.

Fyritøkan var nummar eitt í øllum heiminum innan sítt yrki; har arbeiddu 500 fólk og tveir triðingar vóru kvinnur. Eisini í toppleiðsluni. Viðurskiftini fyri kvinnur vóru góð. Millum annað fingu tær eitt heilt ár barnsburðarfarloyvi, um tær høvdu starvast í fyritøkuni tvey samanhangandi ár.

Taka vit Føroyar, so eru uppaftur færri – fyri ikki at siga ongin kvinna at síggja í ovastu leiðsluni í teimum heilt stóru fyritøkunum. Sum til dømis í peningastovnum; har tú sjálv arbeiðir, tryggingarfeløg og aðrar stórar fyritøkur. Har síggjast bert slips og jakkasett á ovastu rók. Hvat er orsøkin?

– Orðið skiparamentan hevur onkuntíð verið at hoyrt, og Føroyar sum fiskivinnutjóð hava eina skiparamentan. Traditionelt hava kvinnurnar ikki »staðið á brúnni« í fiskivinnuni, kanska mest tí vinnan ikki hevur verið so áhugaverd fyri kvinnur. Eg havi størstu virðing fyri teimum føroysku sjómonnunum. Abbi mín, Tummas Hansen, var sjálvur ein av teimum, men sló tíverri út undir krígnum. Hann var við Skálaberg. Omma stóð eftir við nógvum børnum, so eg eri væl vitandi um, hvussu hart og váðafult hetta lívið kann vera, eisini fyri familjuna, sum er eftir á landi.

### Mynstrið broytist

Vinnumynstrið í Føroyum broytist og fyritøkur, serliga innan tænastuvinnuna hava vunnið seg fram seinastu árini og leita eisini út um landoddarnar. Hetta eru vinnur, sum flestu kvinnum dáma væl at arbeiða innan fyri og klára seg væl í. Men hví tað eru so fáar kvinnur í toppleiðsluni? Eg kann geva tær eitt persónligt dømi:

Fyri fáum árum síðani søkti eg eitt starv sum deildarstjóri á eini størri føroyskari fyritøku. Starvið var eitt dreymastarv, og eg leyk øll krøv til útbúgving og starvsroyndir sambært starvslýsingini. Til setanarsamtaluna vóru tað forstjórin, ein deildarstjóri og eg. Við endan av tí triðju setanarsamtaluni sigur deildarstjórin brádliga: »Vit ivast í tær, tí tú ert kvinna«. Eg trúði ikki mínum egnu oyrum og bleiv púra paff. Tað haldi eg, vit øll blivu í nøkur sekund. Har var pínlig tøgn, aftan á at deildarstjórin hevði hugsað hart. Seinni hugsaði eg, hví ikki seta tað í lýsingina beinanvegin, at kvinnur eru óynsktar, so sleppur man undan øllum stríðnum við at søkja, tí hatta er alíkavæl ikki ein kvalifikatión, sum tú ført gjørt nakað við.

Hetta eru nøkur ár síðani, og eg síggi tíbetur eina vend. Kvinnur eru komnar inn í toppleiðslur og í fleiri nevndir, og sjálv siti eg til dømis sum næstformaður í nevndini fyri Postverk Føroya. Í Føroya Banka var eitt dóttirfelag, Skyn, sett á stovn í fjør, og har er ein kvinnuligur stjóri. Tað var ongantíð talan um, at tað skuldi vera nakar annar enn hon.

Innihaldið í arbeiðinum hevur eisini nógv at siga. Fyri meg er tað at fáa avbjóðingar og kenna á sær, at ein ger mun, umráðandi. Tá verður tað stuttligt at arbeiða. Leiðslan í Føroya Banka hevur ongan trupulleika við at býta út stórar og krevjandi uppgávur, eisini til kvinnur. Eg haldi, at ein orsøk til, at leiðslustørvini ofta eru so áhugaverd, kann vera, at avbjóðingarnir og tann góða lønin hava ligið har. Hetta broytist spakuliga í takt við, at kappingin harðnar og troðkar seg meira inn á okkum. Kappingin ber í sær, at virkini í størri mun mugu menna síni starvsfólk og seta serfrøðingar av ymiskum slag og førleikum fyri at gerast meiri kappingarfør. Tá veksur ábyrgdin og tær spennandi uppgávurnar út um leiðsluna, og lønarlagið uttan fyri leiðsluna hækkar. Kanska átti man eisini spakuliga at komið burtur frá verandi lønarlagi, sum í ov stóran mun gevur leiðarum fyrimun. Løn átti í størri mun at verðið givin eftir avrikum.

Brynhild Setberg heldur tað vera gott, at kanningar verða gjørdar av støðuni og livihátti hjá útisetum í Danmark við tí fyri eyga at fáa so nógvar heimaftur sum møguligt. Hetta átti eisini at fevt um føroyingar í øðrum londum.

Í mínum førum var tað hvørki løn ella sjálvt starvið, sum fekk meg at koma heimaftur, men fyrst og fremst, tí eg eri føroyingur. Eg kendi tað sum mína skyldu at koma aftur og gera nakað fyri tað samfelagið, sum gav mær teir møguleikar, eg havi gjørt brúk av. Vit plaga at siga, at tað er so og so gott at búgva í Føroyum, men tað er sanniliga eisini gott at búgva nógva aðrastaðni, sigur Brynhild Setberg og tekur brøður sínar sum dømi.

– Teir búgva sera gott í Kalifornia. Báðir hava fingið sær amerikanska familju, góða útbúgving og gott starv, men báðir leingjast heimaftur. Serliga annar kundi væl hugsað sær at komið aftur til Føroya, men tað verður ikki fyri einhvønn prís. Hann hevur gjørt alt fyri at varðveita tað føroyska og lærir millum annað smáu børnini hjá sær føroyskt. Føroyar mugu tí skapa umstøður fyri at gera tað meiri lokkandi fyri útisetar at koma aftur. Millum annað stendur lønin als ikki mát við til dømis bústaðarprísirnar í miðstaðarøkinum, sigur Brynhild Setberg.